– trygt og ómakaleyst til hús

# Snotilig og dámlig hús á Argjum



**Húsini eru áhugaverd og livilig, sterkt og væl bygd. Her er góður møguleiki fyri at liva og at trívast.**









## Umhvørvi

Tú koyrir út á Argir niðan móti AB-vøllinum og sneiðir til vinstru niðan í Reynstún. Har finnur tú hesi frálíku húsini, og komin niðan til húsini og inn, sært tú við tað sama, at hetta eru eini dygdargóð hús við mongum møguleikum til bústað, virksemi og trivnað. Húsini standa í náttúruvøkrum, friðarligum, veðurgóðum og barnavinaligum umhvørvi við góðum grannalagi. Dagstovnar, skúli, fótbóltsvøllur og busssamband er nær við. Har er frálíkt útsýni yvir Havnina og út í Havnadal. Alt er sera snøgt gjørt uttanfyri, og alt er gjørt soleiðis, at tað er lætt at halda.

## Ljós og luft

Húsini standa væl í mun til sólargang, ljós og luft. Tú hevur sólina allan dagin. Í túninum aftanfyri húsið er tað sum í eini grýtu ein góðan dag. Vindeyguni geva nógv ljós inn og frálíkt útsýni út, og tey undirstrika blíða arkitekturin og prýða húsini, og sjálvt um tú sært væl út og hevur samband við umhvørvið uttanfyri, kanst tú væl og virðiliga vera ósædd/ur og í friði inni hjá tær sjálvum.

## Stílur og snið

Inni er stílurin lættur og ljósur, men ber eisini brá av tyngd og dygd við tað, at gólv, loft og hurðar eru úr massivum træ. Alt er sera snotiligt og sera væl hildið. Húsini eru gjørd úr góðum tilfari við góðum handverki. Her kunnu húsfólk í øllum aldrum og við mongum ymiskum áhugamálum liva og trívast. Í ovaru hædd er felagsøki til alla familjuna, hjúnarrúm við egnum baðirúmi og barnakømur við felags baðirúmi við bæði brúsu og baðikari. Í niðaru hædd er stórt kjallararúm, ið væl kann innrættast, so niðara hædd verður ein sjálvstøðug íbúð, um tørvur er til tess. Húsini eru dagførd í 1994 og aftur seinni og eru sera væl hildin, so tey sýnast sum nýggj.

## Innrætting

Í miðhæddini er inngongd, durur, gong, hjúnarrúm við egnum baðirúmi, 2 kømur, baðirúm við kari og brúsu, bryggers / vaskirúm við egnari inngongd. Í ovastu hædd er køkur / alrúm við útgongd til útigólv og panoramaútsýni oman yvir Havnina og úr á fjørðin. Í niðastu hædd er inngongd, durur, 1 størri rúm (garaga til 2-4 bilar) og 1 minni rúm, fýrrúm og goymslurúm. Betondekk er millum niðaru hæddirnar.

## Fakta:

Addressa: ...........Reynstún 26, Argir
Byggiár: .............1984 / 1994
Hæddir: ..............3
Gólvvídd: ...........300 m²
Grundøki:............576 m²
Bilhús: ................Ja
Prísuppskot: .....kr. 2.100.000









PF INNI
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**